# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

## Tøkk

Øllum tykkum sum á ymiskan hátt gleddu meg á 90 ára føðingardegnum 11. august takki eg hjartaliga.

**Blíðar heilsur**
**Anna Hansen, Norðragøta**

## Tøkk

til øll tykkum, sum mintust meg á 75 ára degnum. Tit, ið ringdu, sendu fjarrit og gávur. Øll tit mongu, sum komu og heilsaðu uppá meg. Vita skulu tit, at tit gleddu meg ómetaliga nógv. Harrin signi tykkum.

**Blíðar heilsanir**
**Ísak Bjarnaskor, Viðareiði**

## Tøkk

Takk øll tit, ið mintust meg á 70 ára degi mínum hin 17. juni við gávum, fjarritum, blómum, telefonsamrøðum og tykkum, ið komu inn á gólvið og gjørdu mær dagin so hugnaligan og ógloymandi. Og ikki at gloyma tykkum, ið hjálptu til.

**Kærar heilsur**
**Karin Johansen, Hov**

## Takkarheilsan

*Hjartaliga takki eg øllum teimum mongu, sum stukku inn á gólvið á mínum fimmti ára degi.*

*Stóra tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit og heilsanir.*

*Finnbogi Arge*



# Samverkamenn takka fyri stuðulin

**Leygardagin 27. august 2005 var eitt stuðulstiltak í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, sum trúboðanarfelagsskapurin Samverkamenn skipaði fyri. Tiltakið var til frama fyri ein lærusveinaskúla í Pakistan**

TÍÐINDASKRIV

Stuðulstiltakið byrjaði um morgunin við eini innandura fótbóltskapping, har fleiri lið høvdu teknað seg, bæði gentu- og dreingjalið.

Um kvøldið møttu umleið 7-800 fólk til sjálva stuðulskonsertina. Bólkarnir sum luttóku vóru: Salt, Maria Anderssen og Heini Lützen, saman við fleiri góðum tónleikarum. Eisini undirhelt búktalarin Absalon Áagarð. Ljóðgóðskan



var góð, og bólkarnir spældu allir framúr væl.

Tiltakið var við til at stuðla einum lærisveinaskúla í Pakistan, ein verkætlan sum føroyski trúboðanarfelagsskapurin Samverkamenn skipar fyri. Konsertin var ókeypis, men fólk høvdu møguleika at geva til lærisveinaskúlan.

Eisini var á stórskíggja upplýst um lærusveinaskúlan í Pakistan, og hvat felagsskapurin Samverkamenn stendur fyri.

Fyrireikarinir eru sera væl nøgdir við tiltakið og takka fyri alla hjálp og stuðul. Peningurin sum kom inn, nøktar umleið 20 prosent av tí sum tørvur er á til lærusveinaskúlan.

Í apríl 2006 verður ein listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík, har vinningurin eisini fer til lærusveinaskúlan.

Fleiri myndir frá konsertini eru at síggja á heimasíðuni:
www.samverkamenn.org

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**